Kappingareftirlitið

Netcompany Group A/S
Strandgade 3
1401 København K

Att. Peter E. Strassen

Tórshavn, tann 05-03-2025

Viðv. mál nr.: 25/00082

Kappingareftirlitið fekk tann 11. februar 2025 einfalda fráboðan, sbrt. § 16, stk. 1, um, at Netcompany Group A/S yvirtekur SDC A/S.

Talan er um eina transaktión sum kemur undir samanleggingarhugtakið í §13, stk. 1, nr. 2, í kappingarlógini. Talan er um eina samanlegging eftir §13, stk. 1, nr. 2, tá ið ein ella fleiri persónar, sum longu hava ræðið á minst einari fyritøku, ella tá ið ein ella fleiri fyritøkur við keypi av pørtum ella ognum gjøgnum avtalu ella á annan hátt fáa beinleiðis ella óbeinleiðis ræði á allari ella pørtum av einari ella fleiri fyritøkum afturat.

Samanleggingin skal fráboðast, sbrt. §16, stk. 1, í kappingarlógini, tí minst ein av luttakandi fyritøkunum hevði ein árligan umsetning í Føroyum á 75 mió. kr. seinasta roknskapar ár og minst onnur av luttakandi fyritøkunum hevði ein umsetning á 75. mió. kr. á heimsstigi seinasta roknskapar ár, sbrt. §14, stk. 1, nr. 2, í kappingarlógini

Fráboðað er eftir einfaldum leisti, tí fráboðað er eftir § 3, stk. 1, nr. 6, í reglugerð nr. 2 frá 3. januar 2025. Ein samanlegging kann fráboðast eftir § 3, stk. 1, nr. 6, um samanleggingin er fevnd av ásetingini um altjóða umsetning, sbrt. § 14, stk. 1, nr. 2, í kappingarlógini.

Netcompany Group A/S er ein donsk KT-fyritøka skrásett á Nasdaq OMX Copenhagen exchange. Netcompany Group A/S hevur heimstað í Danmark, men hevur eisini kontór í Pólandi, Grikkalandi, Luksemborg, Vietnam, Niðurlondum, Norra og Onglandi. Netcompany Group A/S hevur lagt seg eftir at veita heildarloysnir innan KT-tænastur, við dent á kritiskum KT-loysnum til størri almennar og privatar kundar. Netcompany Group A/S veitir ikki heildarloysnir innan KT-tænastum til bankar og aðrar fíggjarfyritøkur.

SDC A/S er ein donsk fyritøka, sum hevur heimstað í Danmark. SDC A/S er ein heildarveitari av KT-loysnum til bankar og fíggjarfyritøkur. SDC A/S hevur kontór í Pólandi, sum fæst við viðlíkahald og menning av KT-loysnum, og eitt sølukontór í Norra. SDC A/S var stovna sum eitt felag átt av bankum, við tí endamálið at fáa betri úrtøku av teimum KT-loysnum sum bankarnir høvdu tørv á. SDC A/S er átt

av 41 bankum í Danmark, Føroyum, Norra og Svøríki, har flestu tænasturnar verða keyptar av eigarunum sjálvum, men veitir SDC A/S eisini tænastur til eitt minni úrval av kundum, sum ikki eiga í felagnum.

Yvirtøkan er skipa á tann hátt, at Netcompany Group A/S keypir allan partapeningin í SDC A/S fyri eina upphædd á **[...]** DKK, sum síðan ferð at hava fult ræðið á fyritøkuni.

Kappingareftirlitið hevur við heimild í § 15, stk. 5, í kappingarlógini, tikið avgerð um, at góðkenna yvirtøkuna hjá Netcompany Group A/S av SDC A/S, vísandi til § 15, stk. 2, í kappingarlógini, um at ein samanlegging, sum ikki munandi forðar fyri virknari kapping, skal góðkennast.

Góðkenningin av samanleggingini er givin við støðið í upplýsingunum, sum fráboðaðari hevur latið Kappingareftirlitinum og er treytað av, at upplýsingarnar eru rættar, sbrt. § 20, stk. 3, í kappingarlógini.

Vegna

Kappingareftirlitið

Terje Sigurðsson
Deildarstjóri

Teitur Friduson Andreasen
Fulltrúi